Skjal (21)

Etiska ráðið

Tórshavn 14. september 2018
-/bát

Etiska ráðið
Granskingarlonin
J.C. Svabosgøta 43
100 Tórshavn

Til
Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn
amr@amr.fo

**Hoyring um Uppskot um løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógin)**

Etiska ráðið hevur fingið omanfyrinevnda lógaruppskot til hoyringar og skal við hesum koma við fylgjandi viðmerkingum.

Sambært almennu viðmerkingunum skal Vælferðarlógin loysa av verandi forsorgarlóg, og tí er uppskotið í høvuðsheitum grundað á hesa lóg, hvørs endamál millum annað er at tryggja eitt evsta fíggjarligt trygdarnet og tænastur til borgarar, sum av eini ella aðrari orsøk hava tørv á uppihaldshjálp og tænastum frá tí almenna.

Etiska ráðið tekur undir við, at neyðugt er við lóg, ið virkar sum trygdarnet, og at slík lóg eigur at taka støði í og leggja dent á "sjálvsavgerðarrætt borgarans, soleiðis, at tænastur og veitingar verða veittar við støði og ynski borgarans í mun til egna lívsstøðu, og soleiðis, at borgarin hóast tarn ella sjúku fær eitt fyri hann nøktandi og innihaldsríkt lív." (s. 17 í almennu viðmerkingunum).

Hetta er í samsvari við etisku regluna um, at dentur eigur at verða lagdur á virðingina, tignina og integritetin hjá einstaka menniskjanum.

Fyri at tryggja borgarum eitt ávíst fíggjarligt trygdarnet, góða tænastu, rættartrygd og møguleikar at liva eitt so virkið lív sum gjørligt, inniheldur uppskotið ásetingar um skyldur hjá tí almenna at ráðgeva og upplýsa hvørjar veitingar og tænastur borgarin kann fáa, og eins væl upplýsa um skyldur borgarans. Hetta tekur Etiska ráðið undir við, líkasum tað skilagóða, at lógin nágreinar, hvørjar uppihaldsveitingar og tænastur talan eru um, og hvørjar treytirnar eru. Roynt verður at laga hesa vælferð til føroysk viðurskifti.

Avbjóðingarnar í slíkum ætlanum eru at fáa amboðini, ið skulu til fyri at bøta um ella loysa trupulleikan, at vera nøktandi. Í hesum føri er neyðugt, at hyggja at fíggjarkørmunum, tað verið seg lógarbundnu- og rakstrarkørmunum, umframt sosialfakligu, námsfrøðiligu og viðgerðarligu krøvunum.

Verður hugt at teimum lógarbundnu kørmunum, er tað soleiðis, at um so er, at borgari hevur ein ávísan fíggjarligan tørv vegna eina almannahending, fær viðkomandi eina uppihaldshjálp. Sjálvsagt kann altíð verða spurt, um upphæddin er nøktandi. Etiska ráðið hevur onga viðmerking til hetta, uttan at mett verður, at umráðandi er, at veitingarnar ikki forða borgaranum at liva eitt sømiligt lív.

Viðvíkjandi at liva eitt sømiligt lív, metir Etiska ráðið, at ásetingin í § 22, stk. 4 um, at uppihaldshjálp kann verða steðgað, um borgari uttan haldgóða grund ikki tekur av tilboði um at betra um møguleikan at koma í arbeiði, skal brúkast við størsta varsemi. Hetta eigur at verða speglað aftur í kunngerðini.

Viðvíkjandi heimildini at veita endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til persón, sum ansar nærskyldum við seinheilaskaða § 25, stk. 1, nr. 3, dugir Etiska ráðið ikki at síggja hvør grundin er til, at júst hesin bólkur verður tikin fram um onnur tá tað snýr seg um tørv á vardum bústaði, sí § 46. Til hesa grein skal eisini viðmerkjast, at Etiska ráðið metur tað vera ein váða, um myndugleikin metir, at tørvurin at útvega pláss á vardum bústaði verður loystur við hesari fyriskipan.

Við rakstarkørmunum er øðrvísi, tí her kann gerast galdandi, at borgari, ið hevur tørv á tænastu, ikki fær ta neyðugu hjálpina, tí eingin fígging er. Hesin trupulleiki verður nevndur í viðmerkingunum til lógina, har tað m.a. verður víst á, at "tað er upp til politiska myndugleikan at raðfesta støði á tænastunum", (s. 63).

Tað er upp til politiska myndugleikan at avgera støðið á tænastunum, eins og á teimum lógarbundnu veitingunum, men tá tað sambært viðmerkingunum til lógina verður mett, at tað við tíðini verður neyðugt at hækka játtanina við umleið 64 mió. kr. fyri at nøkta tørvin hjá øllum borgarum, sum hava tørv á tænastum, metir Etiska ráðið, at tað hevur stóran týdning, at reglur verða gjørdar, ið lýsa, hvussu tænastur verða raðfestar. Neyðugt er, at gjøgnumskygni er í hesi viðurskifti, soleiðis at borgarar fáa innlit í, hvørji atlit verða tikin, tá ið ein tænasta verður veitt ella ikki veitt. At tað er greitt, hvussu arbeitt verður við bíðilistum.

Harnæst er eisini umráðandi, at borgarin fær greiða fatan av viðgerðarætlanini, soleiðis at henda kann fara fram innan tað økið, sum gevur honum bestu hjálpina og møguleika at fáa eitt so innihaldsríkt lív sum gjørligt.

Umráðandi er eisini at tryggja, at viðgerðargongdin frá sjúkrahúsi til almannaøkið verður skilagott løgd til rættis. Tørvurin broytist gjøgnum eina rehabiliteringsgongd, og tískil verða aktørarnir skiftir út eftir tørvi. Hetta merkir, at innan hvørt økið er neyðugt við eitt nú starvsfólki við serkunnleika, toymisarbeiði og høgum vitunarstøði, og at tey, ið virka innan hetta økið, arbeiða neyvt saman. Skal hetta eydnast og álit vera á skipanina mugu partarnir – sjúkrahús, almannaverk og kommunur –, ið varða av tænastuni, hava gott samstarv og fakliga stuðla hvør øðrum.

Etiska ráðið leggur annars til merkist, at í fleiri førum innan tænastuøkið verður ásett, at tænasta "verður veitt". Slík áseting kann merkja, at tá ið borgari t.d. lýkur treytirnar at fáa endurvenjing,

fyribils bústað ella stuðulstænastu, skal hetta veitast, líkasum tá ið borgari fær veiting grundað á eina almannahending. Etiska ráðið heldur, at vendingin "verður veitt" kann vera misvísandi, tá tað í fleiri førum í uppskotinum verður lagdur dentur á, at støðið á tænastuni er tengt at fíggjarliga rásarúminum hjá myndugleikanum.

Vælferðaruppskotið hevur avleiddar broytingar við sær í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (markamót).

*

**Hoyring um Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (markamót)**

Etiska ráðið hevur eisini fingið omanfyrinevnda lógaruppskot til hoyringar og skal við hesum koma við fylgjandi viðmerkingum.

Við broyting í § 10 fáa kommunurnar m.a. ábyrgd av at veita tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt til persónar (undir 67 ár) sum búgva í egnum heimi, ið hava varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi. Í viðmerkingunum verður víst til persónar við alzheimers, demens og sclerosu á 2. stigi sum dømi.

Etiska ráðið metir, at tað kunnu vera fleiri trupulleikar við hesi broytingini.

Eitt nú verður mett, at allýsingin av sjúkudømum er ov avmarkandi og fer tí framhaldandi at skapa markamótistrupulleikar. Vandi er sostatt fyri, at ógreiðan førir til, at persónar við ymiskum sjúkum, ið ikki viðgerðarliga hóska saman, skulu hava sama tilboð.

Harumframt er vandi fyri, at ógreiðan førir til, at persónar við sjúkugreining ið krevur servitan og viðgerð skulu hava tilboð frá eldratænastuni. Henda servitan liggur hjá tí almenna og ikki hjá kommununum, sum er fyrsta liðið og sum hevur tað mest generellu vitanina og veitir tað mest generella tilboðið.

Í viðmerkingunum verður greitt frá, at broytingarnar í lóg um heima- og eldrarøkt v.m. standast av ósemjuni um markamóti millum Kommununar og Almannaverkið. Etiska ráðið metir tað er umráðandi at tryggja, at lógarásetingarnar verða framdar út frá einari visjón um rættindi hjá borgaranum til eina dygdargóða tænastu.

**Viðvíkjandi tvingsil í Vælferðarlógini**

Sum víst á omanfyri so tekur Etiska ráðið undir við, at Vælferðarlógin byggir á sjálvavgerðarrættin hjá einstaka borgaranum. Í lógini verður tó skotið upp, at heimilað Almannaverkinum í ávísum førum at veita tænastu við tvingsli. Sum skilst, kann hetta koma upp á tal, tá ið Almannaverkið skal veita persóni fyribils bústað eftir § 45 (búð- og

viðgerðarstovni ella stovnslíknandi fyriskipan) ella vardan bústað eftir § 46 (búfelagsskapi ella á sambýli) í sambandi við rættarúrskurð ella dóm v.m.

Etiska ráðið viðurkennir, at tað í heilt serligum førum kann verða neyðugt at veita tænastu við tvingsli. Av tí at hetta eina og aleina skal vera í undantaksførum, verður hildið, at tað er skilagott at regulera hetta í lógini, og at tilmælið verður lagt fyri eina serliga nevnd, ið arbeiðir sambært serligari lóg, nevnd Tvingsilslógin.

*

**Hoyring um Uppskot um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin)**

Etiska ráðið hevur fingið omanfyrinevnda lógaruppskot til hoyringar.

Uppskotið til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin) er lisið og viðgjørt sambært hugtøkunum paternalisma og autonomi.

Ásannandi, at tað kann verða tvørligt og ofta ómøguligt at lýsa við dømum, nær smærri og størri inntriv eru til gagns fyri persónin, sum talan er um, so tykist lógarsmíðið, eins og viðmerkingarnar, at verða farið út í æsir við at tryggja autonomiina hjá persóninum, og samstundis tykist lógaruppskotið og viðmerkingarnar eisini at hava innbygt øll neyðug fyrilit hjá myndugleikum og starvsfólkum, so at tey kunnu røkja sína alneyðugu paternalistisku uppgávu sum best.

Ein tvingsilsnevnd er eitt gott og neyðugt átak og kann ikki minst standa vernd um tann persónin, sum skal verða fyri inntrivum.

Etiska ráðið viðmælir øll lógaruppskotini, sum nevnd eru omanfyri.

Vinarliga

Vegna Etiska ráðið

Hildur við Høgadalsá, forkvinna